

Vaskikonurnar fingið nevan fyri næsarnar

Skulu gera sama arbeiði fyri nógv minni løn

Vaskikonurnar við kommunalu skúlarnar í Havn fingu fríggjadagin skrivlig boð frá býráðnum um at fara 1300 krónur niður í løn. Svaraðu tær ikki í seinasta lagi mánadagin roknaði býráðið við at niðurskurðurin var góðtikin.



Nú skulu vaskikonurnar við kommunalu skúlarnar í Havn stívliga 20 prosent niður í løn. Mynd: Kalmar.



...ýráðið hevur við skriv frá 22. juni 1990 vent sær til Havnar ...arbeiðskvinnufelag við áheitan um fund, við tað at býráðið ...nskir at endurskoða verandi avtalu um reingerð av skúlum har ...indað verður fyri 6 x 4 tímar ella 24 tímar um vikuna, hóast ...arbeitt verður 5 x 4 tímar um vikuna ella 20 tímar. Men tað ...ikki hevur nýbnast býráðnum at fáa í lag fund í hampuligari tíð ...ðrenn skúlarnir byrja aftur eftana summarfrítíðina, er avgerð ...tikin um at lógna málið uttan meðvirkan Havnar ...arbeiðskvinnufelags.

...ýráðið skal vísa á viknandi fíggjarligu útlitini fyri ...anfelagið sum heild, og harvið eisini fyri Tórshavnar kommunu, ...g at tað longu nú verður neyðugt at laga útreiðslur ...mmunnar á øllum økjum eftir inntøkunum, um kommunan, sum ...ligartil, skal kunna svara hvørjum sítt.

...annandi at minni verður til samlaðar lønir, og havandi í huga ...setning býráðsins um ikki at siga fólki upp, er avgerð tikin um ...t brøyta løn fyri reingerð av skúlum soleiðis, at møtti ...ingurin (leygardagurin), sum hevur verið við verður tikin ...urtur, og annars at sláka so mikið uppá kravini til reingerð. ...t talið av reingerða konum í skúlunum í samrøð við ...kúlastjórar og skúlastjórar, verður økkað við ikki at ...ndurseta nøkur ætarv.

...onnars er býráðið opið fyri samrøðingum við tygum og ...tarvsfelagar tygurum hetta álvarsta mál, og røkka frágreiðslu ...rslit fyri bæði partar ábrenn skúlarnir byrja aftur.

Fyri tygara vikkandi kemur ein broytt skipan samanbert omanfyri at broyta bruttománaðarløn tygara frá kr. 8.098,67 til kr. 6.748,90. Bruttonýtsgongdin verður kr. 1.349,77 við einum marginalskattaprosenti uppá umleið 46 (skattaskyldug inntøka umleið kr. 75.000,-) verður nettonýtsgongdin umleið kr. 730,-.

Býráðið ventar at frætta frá tygum innan 13. august 1990, um tygum ikki kunnu ganga undir omanfyristandandi.

Vinarliga
p. v.
Høgni Mohr
býráðsskrivari
Jens M. Poulsen
privatovuatjóri

Fíggjarligu útlitini gera, at vaskikonurnar mugu niður í løn, stendur m.a. í brævinum frá kommununi.

Tey 70 reingerðingarfólkini við kommunalu skúlarnar í Havn fingu fríggjadagin brøv frá býráðnum. Í brævinum varð sagt, at løn teirra var ikki longur tær umleið 8.000 krónurnar, hon hevur verið, men einar 1300 krónur minni. Í brævinum varð eisini sagt, at fekk býráðið ikki svar í seinasta lagi mánadagin varð roknað við, at reingerðingsfólkini góðtóku lønarniðurskurðin.

ÓFÓLKALIGT

Svanhild Danielsen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, har reingerðingarfólkini eru limir sigur, at hetta krav býráðsins má sigast at vera sera órímiligt og ófólkaligt. Fyrst at seta tær frammanundan lágt løntu vaskikonurnar so nógv niður í løn, og harnæst at krevja svar eftir einum vikuskifti. Hon sigur, at summartíð er og skúlarnir, har fólkini hava sítt arbeiði, enn eru í summarfrí. Tí eru fleiri limir ikki lættir at fáa til fundar og harnæst hava fleiri av nevndarlimunum verið burturstaddir.

YNSKJA FUND VIÐ BÝRÁÐIÐ

Havnar Arbeiðskvinnufelag hevði fund um málið mikukvøldið. Svanhild Danielsen sigur, at tey vóna at fáa ein fund við býráðið so eisini teirra sjónarmið kunnu verða hoyrd. Hendan fund vónar hon at fáa áðrenn skúlarnir lata uppaftur og vaskifólkini fara til arbeiðis aftur.

Hóast lønin fer niður ivast forkvinnan í Arbeiðskvinnufelagnum ikki í, at vaskifólkini hava í minsta lagi eins nógv at gera sum áður,- men nú fyri nógv minni løn.

tór.-

Jógvan við Keldu:

Kuwait Petroleum somu tænastu til føroyingar sum fyrr

Eftir irakisku innrásina í Kuwait eru tað sjálvandi mangir spurningar, ið verða reistir hjá viðskiftafólki og øðrum, ið hava nakað samband við Q8 (Kuwait Petroleum) oljufelagið.

Kuwait Petroleum International og Kuwait Petroleum handilsfeløgini í Danmark, Svøriki, Hálandi, Belgiu, Luxemburg, Týsklandi, Fraklandi, Italiu, Stórabretlandi og Tailandi eru dótturfeløg, sum eru ogn hjá felagum, ið aftur eru 100% í hondunum á Kuwait Petroleum Corporation.

KPC (Kuwait Petroleum Corporation) er ogn hjá Kuwaitiska lýðveldinum, hvørs lógliga stjórn nú heldur til uttan fyri Kuwait, men sum støðugt er í sambandi við øll síni útlendsku feløg.

Sum kunnugt, hava USA og hópur av øðrum londum, teirra millum Danmark, gjørt av at verja ognirnar hjá lógligu stjórnini í Kuwait, við m.a. at læsa ávísar bankaognir.

Endamálið við hesum er sjálvandi at forða fyri, at útgjaldingar verða framdar til hesar, sum í løtuni herseta kuwaitiska lýðveldið.

Soleiðis hava stjórnirnar, sum hava læst ella innifryst hesar ognir, ruddað slóð fyri, at Kuwait Petroleum-feløgini kunnu reka vanligt handilssamskifti við tey lond, har Q8 (Kuwait Petroleum) arbeiðir.

Ú frá hesum verður gjørt kunnugt, at Kuwait Petroleum (Danmark) A/S — sum Føroyar eru partur av — uttan trupulleikar frmhaldandi geva kundunum somu tænastu sum áður. Við hesum verður eisini gjørt greitt, at inngjaldingar til felagið, ikki undir nøkrum umstøðum fara til teirra, sum í løtuni herseta kuwaitiska lýðveldið.

Niðurstøðan er tí henda:

1. Eingin peningur fer til teirra, sum í løtuni herseta kuwaitiska lýðveldið.
2. Kuwait Petroleum hevur ongar trupulleikar at veita kundunum somu tænastu sum áður. Goymslurnar eru fullar, umframt at úrdráttir verða keyptir til vanligar treytir á vanliga opna marknaðinum.
3. Tað eru eingir trupulleikar at figgja óbroyttan rakstur av felagnum Q8 Kuwait Petroleum A/S (Danmark).

Umframt innflutning av smyrjiolju til Føroya frá Q8 (Kuwait Petroleum) — í samvinnu við felagið P/f Mercant í Klaksvík — bunkra føroysk skip eisini Q8 olju í donskum havnum.

Við heilsanum

P/F MERCANT
Jógvan við Keldu

FT Atlantsflog
DANAIR
ICELANDAIR
SAS
Faroe Travel
Tlf.12600